# Føroyar – land og tjóð!

**Formaðurin í Stjórnarskipanarnevndini, Jóan Pauli Joensen, vónar, at okkara fólkavaldu megna at finna fram til eina tjóðskaparliga semju, har vit seta orð á, hvørji vit eru, og staðfesta mannarættindi. Ætlanin er, at uppskotið til nýggja stjórnarskipan skal verða handað løgmanni 31. desember í ár**

STJÓRNARSKIPAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Vit, fólkið í Føroyum!

So fínt byrjar formælið til uppskot til nýggja stjórnarskipan fyri Føroyar. Og tað er heldur á hvørjum degi, at eitt fólk sleppur at definera seg sjálvt og seta orð síni virði. At kalla seg land, fólk og áseta mannarættindi.

At smíða og evna til eina politiska skipan, sum skal staðfesta og seta á stovn fólkaræði, er ein hin største avbjóðingin, eitt fólk kann fáa, verður sagt.

Men tað hendir í hesum døgum, nú Stjórnarskipanarnevndin ger uppskot til Sjórnarskipan Føroya.

Ein av uppgávunum hjá Stjórnarskipanarnevndini er javnan at kunna um arbeiðið í nevndini, og ein liður í hesum arbeiði varð hildin á Hotel Hafnia fyrrapartin í dag, har nevndin bjóðaði til tíðindafund.

Jóan Pauli Joensen er formaður í nevndini, og hann ásannaði, at tíðin ikki stendur í stað. Tað eru nú meira enn tvey ár síðani, hann sum formaður í tí táverandi Grundlógarnevndini handaði táverandi løgmanni, Anfinni Kallsberg, tað sonevnda Fyrra flaggdagsálitið.

Tað seinna flaggdagsálitið kom ongantíð, av tí at val varð útskrivað, og samgongan við Javnaðarflokkinum, Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum samtykti at broyta Grundlógarnevndina til Stjórnarskipanarnevnd, og heitti á nevndina um at gera uppskot til grundleggjandi stjórnarlóg fyri Føroyar. Arbeiðið í nevndini byggir í ávísan mun á arbeiðið hjá gomlu Grundlógarnevndini.

### Ongar kenslur í stjórnarskipan

Formaðurin segði m.a. á tíðindafundinum, at tað hanga ymsar kenslur uppi í orðinum grundlóg, sum ikki hanga uppi í stjórnarskipanarlóg – ella tí snøggara stjórnarlóg, sum formaðurin heldur ynskti at kalla lógina.

Men uttan mun til hvat barnið skal eita, so er talan um eina konstitutión fyri Føroyar, varð sligið fast. Arbeiðið hjá nevndini skal vera liðugt í seinasta lagi 31. desembur 2006, og síðani skal løgmaður avgera, hvussu leikur fer.

Arbeiðið hevur verið býtt í tveir arbeiðsbólkar – Stóra kamar, sum er sjálv nevndin, og Lítla kamar, sum eru serfrøðingarnir. Ta fyrstu tíðina gjøgnumgekk nevndin nágreiniliga bæði lógartekst og viðmerkingar, men formaðurin segði, at arbeiðið hevur gingið skjótari, um tey fyrst hava fingið lógargreinirnar upp pláss og síðani viðmerkingarnar.

Flaggdagsálitið hevði 100 greinir, men hetta nýggja uppskotið kemur helst at innihalda færri greinir.

### Tjóðskaparlig semja?

Í sambandi við stjórnarskipanararbeiðið er tað ein spurningur, um tað fer at eydnast at skapa tjóðskaparliga semju í Føroyum um hesa lóg. Jóan Pauli Joensen helt, at hetta skyldaðu tey Føroya fólki, nú komið er so langt í okkara samleika sum fólk og tjóð, sum hann tók til, og at hetta eigur at verða ítøkiliggjørt í okkara egnu stjórnarlóg.

Hann vísti á, at í t.d. USA hevur hvør statur sína stjórnarlóg, og tað sama er fyri hvørt land í Týsklandi. Hann segði eisini, at danskir løgfrøðingar hava borið upp á mál, at hetta skuldi verið gjørligt fyri Føroyar, men so leingi vit eru í danska ríkinum, hava vit eisini ta donsku grundlógina, sum formaðurin metti helst í summum førum kemur at vera yvir tí føroysku stjórnarskipanarlógini.

– Neyvan fara danir at senda krígsskip til Føroya, fyri tað um vir fáa okkara egnu stjórnarlóg, skemtaði formaðurin.

### Ikki danskar siðvenjur

Jóan Pauli Joensen legði dent á, at nevndin við hesum stjórnarskipanaruppskotinum hevur roynt at hugsað tað leyst frá tí donsku grundlógini. M.a. segði hann, at løgfrøðingarnir í nevndini ikki hava kent seg so bundnar at danskari siðvenju, men hava fingið íblástur aðrastaðni.

Tað fyrra flaggdagsálitið er umsett til enskt mál og útgivið í lítlum bóklingi. Umframt at verða nógv brúkt í miðnámsskúlum, hevur hetta víst seg at vera heppið fyri eina víðari fatan av lógaruppskotinum. M.a. hava longu fleiri lógargranskarar umrøtt álitið í vísindaligum greinum og ritum.

Jóan Pauli Joensen segði seg eisini fegnast sum rektara á Fróðskaparsetrinum um, at áhugin fyri lógargransking er stórur. M.a. skrivar skrivarin í nevndini, Rúni Rasmussen, eina masterritgerð um politiskt ástøði og valdsbýti, og næstformaðurin í nevndini, Kári á Rógvi, er farin undir eina Ph.D.-ritgerð um greining av dómstólum í Norðurlondum. Løgfrøði er nevniliga eitt øki, sum er heldur ótrott havt gransking viðvíkur í Føroyum í mun til t.d. Ísland. Tí vónaði Jóan Pauli Joensen at skjótt at fáa ein sonevndan stjórnardepil í Føroyum, og at Fróðskaparsetrið eisini kann fara undir gransking í jura.




# – Upp aftur meira tjóð enn frammanundan

**At vera í samveldisstøðu við Danmark er eingin forðing fyri at fáa egna stjórnarskipan, siga serfrøðingarnir í Stjórnarskipanarnevndini**

STJÓRNARSKIPAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

"Føroyar eru land og føroyingar tjóð".

Fyri tey flestu ljóðar hetta kanska sum ein sjálvfylgja, men soleiðis ljóðar fyrsta stykki í grein 1 í uppskotinum um Stjórnarskipan Føroya.

Kári á Rógvu, næstformaður í Stjórnarskipanarnevndini, endurtók ein setning hjá Kaj Leo Johannesen, sum hevði sagt, at tu verður ikki nøgdur við eini, hús fyrr enn tú byggir aðru ferð.

Ætlanin er nevniliga at, at Stjórnarskipanarlógin skal koma ístaðin fyri ta núverandi Stýrisskipanarlógina, sum varð sett í gildi miðskeiðis í nítiárunum.

Kári á Rógvu segði, at hendan nýggja stjórnarskipanin skal vera ein samanrenning av tí, sum enn er óskrivað. Tí hóast flestu føroyingar helst munnu kenna seg sum land og fólk, so er tað ein sannroynd, at tað meira enn so kemur fyri, at vit eru kallað við øðrum heitum. M.a. verða Føroyar kallaðar "selvstyrende område" í m.ø. norðurlandaráðshøpi, og danska heimastýrislógin kallar okkum "selvstyrende folkesamfund".

Men Kári á Rógvi vístí á, at nevndin hevur valt at brúka tey elstu orðini, vit hava á føroyskum.

– Tann føroyska skipanin kom fyrst, men síðan rendu vit okkim í aðrar skipanir segði hann.

Hann segði eisini, at orð sum "land" eru hugtøk, ið kongur plagdi at brúka um okkum, og tí eru hesi vald.

Tí eru hugtøk sum lond og ríki vald. Orð, sum í ensku útgávuni eru umsett til "land" og "nation".

### Fakfólkini gera skinnararnar til politikararnar

Hetta eru greiðar mannagongdir, segði næstformaðurin, og vísti á, at nevndarlimirnir sum fakfólk hava gjørt skinnarar til politikkarrarnar, sum síðani kunnu velja, hvørja leið, tey velja.

Tað merkir m.a., at ríkisrættarliga støðan, sum Føroyar eru í, verður tulkað sum ein sáttmálakend samveldisstøða, sum kann sigast upp.

– Her eru greiðar mannagongdir, hvussu man fer í og hvussu man fer ur, segði Kári á Rógvi, og sipaði m.a. til møguligan ES-limaskap.

Spurdur um, hvat signalvirði ein tílík stjórnarskipan fær úti í heimi, segði Jóan Pauli Joensen, at vit við hesum eru upp aftur meira tjóð, enn vit vóru frammanundan, og vit nú betur kunnu siga, hvussu vit fata okkum sjálv.

Kári á Rógvi vísti á, at bæði Ísland og Noreg vóru komin við sínum stjórnarlógum í samveldisstøðu, og við hesum sett orð á samleikanum, sum hann tók til.

Noreg fekk sína "konstitution" í 1814, sum enn hevur stórt saamleikavirði, og Ísland fekk sína 1874.

# Trúarlæran hjá Fólkakirkjuni ikki tryggjað í uppskotinum

**Løgtingið kann sambært uppskotinum um stjórnarskipan veita kristnitrúnni serligar sømdir**

STJÓRNARSKIPAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Ein stórur partur av tíðindafundinum fyrrapartinum snúði seg um § 17, ið er um trúarfrælsi.

Staðfest verður, at "Øll eiga rætt at trúgva og útinna sína trúgv á tann hátt, tey vilja", og "Løgtingið kann veita kristnitrúnni serligar sømdir tó uttan at gera seg inn á aðrar fatanir". Harafturat verður sagt, at "Fólkakirkjan eigur lut eftir gomlum siði".

Nevndin staðfestir við hesum, at kristnitrúgvin verður mett ay hava so stórt virði fyri føroyingar, at hon skal við í eina sjórnarskipan.

Sum dømi varð nevnt, at í londum, har fullkomin javnstøða er millum átrúnaðir er komið fyri, at ivi hevur verið reistur um um, t.d. kristin morgunsangur hevur átt rætt til innivist innan skúlagátt, ella um hetta diskriminneraði aðrar átrúnaðir.

Hinvegin hevur Fólkakirkjan ikki eins tryggan leiklut í tí føroyska stjórnarskipanaruppskotinum, sum t.d. í donsku Grundlógini, har tað er staðfest, at "Den evangelisk-lutherske kirke er den danske folkekirke og understøttes som sådan af staten". Í tí føroyska uppskotinum er støðan meira merkt av, at lógin kann verða statisk, og at kirkjan kann loysa frá "statinum", um fólkið ynskir hetta. Harafturat sigur tað føroyska stjórnarskipanaruppskotið einki konkret um, at trúarlæran hjá Fólkakirkjuni skal vera tann evangelisk-lutherska. Hetta kann merkja, at Løgtingið skal staðfesta trúarlæruna hjá føroysku kirkjuni, um tað kemur upp á tal. Hinvegin kann støðan verða, at danska grundlógin kann verða ein trygd, um ivamál verður um trúarlæru kirkjunnar og Føroyar eru partur av danska ríkinum, varð sagt á tíðindafundinum

Nevnt varð eisini á fundinum, at breið semja var millum tey politisku umboðini í Stjórnarskipanarnevndini um grein 17, sum viðger trúarfrælsi, og at orðingin um, at Fólkakirkjan eigur lut eftir gomlum siði, er nóg góð.